# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur…*



Nr. 192 - 8. oktober 2005



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*


Bókatíðindi:

## Myturnar í nýggjum hami

Saman við forløgum um allan heim er danska forlagið Tiderne Skifter við í eini stórari verkætlan, har altjóða rithøvundar ný- ella endurskriva mest kendu myturnar í søguni.

Í ár kemur kanadiska Margaret Atwood við *Penelopiaden*, sum snýr seg um Penelope og Odysseus, russiski Viktor Pelevin gevur út skaldsøguna *Skrækhjelmen* um Theseus og Minotaurus, meðan Karen Armstrong úr USA innleiðir evnisrøðina við bókini *Mytens Historie.*

Røðin um heimskendu myturnar heldur fram komandi ár við fleiri útgávum.



*Margaret Atwood hevur endurskrivað mytuna um Penelope og Odysseus*

## 300.000 kr bíða

19. november endar landsumfatandi atkvøðugreiðslan um, hvør skal hava bókavirðislønina á 300.000 kr hjá BG Bank, sum er størsta privata bókavirðislønin í Danmark.

Í uppskoti til virðislønina í ár eru Janina Katz fyri bókina *Drengen fra dengang*, Bjarne Reuter fyri *Løgnhalsen* frá *Umbrien* og Helle Helle fyri *Rødby-Puttgarden*.

Í fjør greiddu 25.000 danir atkvøðu, tá Kirsten Thorup gjørdist vinnari við skaldsøguni *Ingenmansland*.



*Bjarne Reuter er í uppskoti til BG virðislønina*

# Bøkurnar og eg



*Lognbrá* var eitt slag av successroman hjá dreingjunum í skúlaflokkinum hjá Dáva Winther - har var dramatikkur og romantikkur, so tað forsló …

**Dávur Winther, leiðari á mentanardeildini hjá Klaksvíkar Býráð**

*1. Hvørja bók lesur tú í løtuni?*

*Da Vinci Mysteriet* eftir Dan Brown.

- Eg var aftur á góðum gomlum gøtum í Horsens herfyri. Tá ið eg las har í 80unum, kom eg at kenna hópin av fólki umvegis eitt rættiliga stórt kór, eg var við í. Har hitti eg landinspektør A. H. Petersen, sum var sera virkin í frímúraralosjuni í býnum, og ráddi mær staðiliga til at gerast limur. Men eg helt, hetta vera ov duldarfult og undarligt. Eg setti nógvar hvassar spurningar, sum eg ikki helt, eg fekk nóg góð svar uppá. Ein sakførari, sum eisini var við í kórinum, var eins spurin, og eg, og hevði betri førleika at spyrja; men alt tóktist dult.

Eg gjørdist ikki limur - eingin ivi um tað! Tá ið eg seinni kom til Horsens aftur, var sakførarin limur í frímúraralosjuni og var vorðin líka duldarfullur, sum hin fyrri. So eg helt fyri, at hann mátti vera bundin metafysiskt onkusvegna. Svarið var: Ja! Hetta styðjaði illgrunan, eg hevði havt alla tíðina...

Á ferðini í Horsens herfyri stakk eg sjálvandi inn á gólvið hjá landinspektør A. H. Petersen. Hann ráddi mær til at lesa *Da Vinci Mysteriet* hjá Dan Brown, og hana royni eg nú at tyggja meg ígjøgnum - "Der er mere mellem himmel og jord, end du tror", sum hann segði...

*2. Er tað onkur bók, tú minnist serliga væl?*

- *Solsikken* eftir Simon Wiesenthal. Spurningurin um at duga og kunna fyrigeva. Ella at trýsta á EXIT! Hetta er kanska kjarnin í jødadóminum og partur av lívsfilosofiini í miðeystri í síni heild, sum elvur til ófriðin, vit kenna so væl.

Í bókini liggur ein SS-maður fyri deyðanum og vil hava fyrigeving frá einum jøda, áðrenn hann doyr. Hann fær ikki fyrigeving, og so rennur hugurin hjá Wiesenthal aftur og fram. Nevnd verða fleiri líknandi dømi, har tú fært teg royndan.

*3. Hvør var fyrsta bókin tú las?*

- Veit ikki rættiliga, men millum tær fyrstu var *Rannvá* eftir Dagmar Joensen Næss, sum mær tókti so hjartaliga synd í, og eg helt, at samtíðin var henni sera miskunnarleys og hørð; *Lognbrá*, *Fastatøkur* og *Men lívið lær* hjá Heðin Brú vóru eisini millum tær fyrstu.

Tað vóru hugtakandi løtur, tá ið lærarin í barnaskúlanum Óla Jákup Jacobsen las *Lognbrá* fyri okkum í skúlanum leygardag, tá vikan var liðin. Vit sótu sum knubbar og lurtaðu. Eg droymdi meg aftur til tað hugnaligа umhvørvið á Sandi, sum eg kendi so væl. Har var romantikkur og dramatikkur í bókini. Í summum førum var hetta successromanin hjá okkum dreingjum, tí slíkt lósu vit ikki. Tað máttu vit ikki. Annars var tað ein áhugaverd og spennandi tíð, bókin tók støði í, hildu vit. Vit høvdu teir (tær) røsku sum fyrimynd.

*4. Hvørja bók vildi tú ynskt, tú hevði lisið?*

At lisið Bíbliuna og Koranina frá A til Z hevði verið áhugavert. Kent mytologiina betri, bæði tí norðurlendsku og grisku. Kent íslendsku sagairnar betri.

Var á Skarvanesi einaferð saman við skyldmanninum Poul Mohr og tveimum frá Íslandi, har annar var søgufrøðingur. Teir prátaðu og skemtaðu um aldargamlar hendingar, sum vóru tær hendar í gjár og kundu greina ættarbond, sinnalag og umstøður. Gjørdu sær eisini sínar hugsanir og metingar um, hvussu umstøðurnar máttu hava verið - sera spennandi.

*5. Hondina á hjarta - lesur tú altíð eina bók lidna?*

Nei, mær dámar væl at lesa í brotum og falla afturáaftur. Serliga tá eg lesi yrkisbókmentir. Og mín definitión av "yrkisbókmentum" er nokkso breið. *Følelesernes intelligens* eftir Daniel Goleman, *Profeten* av Kahlil Gibran og aðrar líknandi filosofiskar/psykologiskar bøkur koma í míni verð undir hesa skipan.

"Barnabók":

## Løgin, løgnari, løgnast

Lars Bukdahl, *Larslars*,
Teknari: Lars Nørgård,
Sesam, 2005

Herfyri góvu teir báðir Lars Bukdahl og Lars Nørgård út eina ikki sørt løgna barnabók fyri vaksin ella barnsligar sálir við meir enn vanliga snirklutum hugflogi. Ì bókini, sum sjálvandi eitur *Larslars*, fær navnframi orðasnillingurin og ummælarin Lars Bukdahl rættiliga bóltað sær við løgnum setningum og uppaftur løgnari søgum saman við nøkrum av teimum løgnastu tekningunum, lesarin hevur sæð.

Søgan um *Larslars* er ógjørlig at endurgeva, tí hon fýkur higar og hagar ímillum verur, sum ikki eru til, uttan byrjan ella enda. Men vit kunnu so nevna gosfjallið, sum forelskar seg í eini mariuhønu ella dagsúklilyktina við svørtum ljósi ella supernjósnaran, ílatin sum ein steikipanna ella Larslars, sum heldur tað flákra so deiliga innan í sær, tá hann hongur toy upp á snórin.

Onkur ummælari vil vera við, at tey mongu hugskotini skugga hvørt fyri øðrum og ætlanini. Men tað er ikki so lætt, tí sum Larslars sigur: "Tað er strævið at fáa so nógv góð hugskot." Onnur halda, at úrslitið av samstarvinum millum høvundan og teknaran er onki minni enn stór list í serflokki.

Bæði Lars Bukdahl og Lars Nørgård hava fyrr givið barnabøkur út, men hetta er fyrstu ferð, teir hava arbeitt saman um eina barnabókaútgávu.





**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**

Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent

FØROYAPRENT
Hoyviksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo